**Røða til bókaframløgu hjá Demokratia, 18. desember 2018 – Kvinnur í kommunalpolitikki 1918-2018**

Takk fyri, at eg eri boðin at til hesa bókaútgávu, og at eg fái høvi at siga nøkur orð. Og eg fari at ynskja tykkum hjartaliga til lukku við útgávuni – hetta er ein týðandi bók, við nógvum viðkomandi greinum, sum eg gleði meg at lesa!

Fyri stutt síðan kom út bók um kvinnur í landspolitikki – nú 40 ár eru liðin síðan fyrsta kvinnan varð vald á Løgtingið. Og nú kemur henda bókin út – Kvinnur í kommunalpolitikki í 100 ár.

Tað gleðir meg, at vit eru so heppin, at tvær so týðandi bøkur verða givnar út. Tað hevur jú ómetaliga stóran týdning, at vit kenna okkara søgu, og at eisini *hesin* parturin av okkara søgu – søgan um kvinnur í politikki – verður skrivað og kend av okkum, sum samfelag.

Nógv er broytt seinnu árini, og tað kann fyri nøkur kennast, sum at nú er alt stríðið av – tí nú er næstan eins vanligt, at kvinnur eru sjónligar á politiska pallinum. Tað er í dag ikki forkunnugt at hoyra kvinnur úttala seg um politisk mál, og at tær sita við valdið.

Men soleiðis hevur ikki verið altíð, og hetta er ein lutfalsliga nýggj støða – og tað eiga vit at hava í huga. Hóast at tað nú er meira vanligt at kvinnur eru virknar í politikki, so skulu vit ikki so nógv ár aftur í tíðina, tá hatta ikki var so.

Kvinnur hava verið virknar í kommunal politikki longri enn í landspolitikki. Hví so man verða, kunnu vit bara gita um. Eg rokni við, at tað bæði er tí, at tey málini, sum verða avgjørd í kommunal politikki, eru nógv tættari uppá okkum borgarar, og tí tað kanska ikki er eins sjónligt, at vera í kommunalpolitikki, sum tá ein velur at stilla upp í landspolitikki.

Tá eg sjálv valdi at stilla upp, var eitt av málinum, sum eg arbeiddi nógv fyri, tá eg var vald inn, at fáa barnaansingina í Klaksvík í góðar og tryggar karmar. Hetta var eitt mál, sum vit arbeiddu sera hart fyri alt hetta valskeiðið, og tá eg bleiv forkvinna í sosialu nevnd, fingu vit veruliga sett ferð á at loysa hetta málið.

Foreldur, ið onga ansing høvdu skipaðu fyri almennum fundi um hetta mál, summir menn í býráðnum søgdu, at tað kom ikki uppá tal at byggja barnagarð, tí hetta var alt ov dýrt, krøvini til hølir, og at hava námsfrøðingar at ansa børnum var alt ov dýrt – tað hevði kommunan ikki ráð til. Hetta málið fylti sera nógv og eg minnist, at tað hjálpti uppá undirtøkuna at siga, at hetta við barnaansing var vinnupolitikkur, tí vinnan kundi ikki virka, um kvinnurnar ikki sluppu til arbeiðis.

Eitt annað mál, sum eg minnist sera væl, snúi sum heimleys, har var eitt ítøkiligt mál, ið vit í sosialu nevnd høvdu funnið eina loysn á, men hvat hendi? Málið bleiv súlta í fíggjarnevndini í langa tíð, men til endans komu vit á mál.

Eg fann skjótt út av, at tað var neyðugt at koma í fíggjarnevndina, tí tað var har, veruliga valdið var. Men tað var ikki so lætt hjá einum konufólki at sleppa framat, og tað kravdi hart stríð. Ikki fyrr enn eg var komin framum hini á listanum, eydnaðist tað at sleppa í fíggjarnevndina, tí tá kundi man krevja tað.

Hesi bæði dømini frá míni tíð í kommunalpolitikki lærdi meg tvey ting: at summi mál koma ikki veruliga á skrá, fyrr enn kvinnurnar fara í politikk, og at skalt tú útrætta nakað, so skalt tú fara eftir sessunum, har valdið er. Tað hava vit kvinnur ikki so lætt við, men tað er neyðugt!

Tað kann tykjast, sum um at eg tosið um okkurt, sum hendi langt síðan, men eg var vald inn í 1998, so tað er altso ikki meira enn 20 ár síðan.

Nú kunnu vit fegnast um, at nógv er broytt – eisini í høvdinum á fólki – so spurningurin um, hvørt ein kvinna megnar at sita við ábyrgd, verður ikki í sama mun havdur á lofti. Og kvinnur hava eisini funnið út av, at tær hava rætt at taka lut í politikki, og at tað kann lata seg gera at flætta tað inn í ein gerandisdag.

Eg fari at takka tykkum í Demokratia fyri, at tit hava tikið stig til hesa bók, og vit við hesi kunnu lesa um nakrar av teimum kvinnunum, sum hava gingið undan okkum, og slóða fyri. Stóra broytingin kom við kvinnulistunum og seinastu árini, hevur Demokratia støðugt arbeitt við at upplýsa, skipa fyri fundum og øðrum tiltøkum fyri at varpa ljós á spurningin. Tað er altíð gott við góðum fyrimyndum, tað ger tað so nógv lættari, hjá okkum, sum koma aftaná.

Við hesi bók fáa vit innlit og hon kann brúkast bæði av skúlanæmingum og eisini sum íblástur hjá fólki at kunnu seg um søguna hjá kvinnum í lokalpolitikki.

Takk fyri, og nú tað stundar til jóla, fari eg eisini at nýta høvi at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól, og takka fyri gott samstarv í brátt farna árið, og ynski um framhaldandi gott samstarv í komandi ári.

Eyðgunn Samuelsen,

Landsstýriskvinna í almannamálum.